*Uttanlandsnevndin út at ferðast:*

# Til Brússel at kunna seg um Evropasamveldið

*Nú løgtingið skal undir eitt aðalorðaskifti um uttanlandspolitikk hildu vit lotuna vera tað røttu, sigur Helena Dam á Neystabø*



*Helena Dam á Neystabø er formaður í uttanlandsnevndini. Hon heldur ferðina til ES-høvuðsstaðin vera sera áhugaverda*

EIRIKUR LINDENSKOV

Í gjár fóru teir sjey limirnir í uttanlandsnevndini hjá løgtinginum til Brussel, har teir skulu kunna seg um ymisk viðurskifti, sum hava við ES at gera.

- Talan er um eina kunningarferð, sigur Helena Dam á Neystabø. Ynski um slíka ferð hevur fleiri ferðir verið frammi.

- Vit hildu løtuna nú vera ta røttu at fara, tí løgtingið í nærmastu framtíð skal undir eitt aðalorðaskifti um uttanríkisolitikk. Onnur orsøk er eisini, at handilsavtala okkara við ES er ov tung - hon virkar ikki nóg væl.

- ES-sjórnirnar skulu eisini hava beina ráðstevnu, har traktatirnar verða latnar upp. Hetta átti tí at verið høvi hjá okkum at gjørt vart við okkara sjónarmið - og fáa eitthvørt broytt.

- Kanaloyggjarnar hava sørvísi viðurskifti enn vit, sigur Helena Dam á Neystabø. - Teirra viðurskifti eru skrivað í protokollatum, meðan okkara eru beinleiðis í avtaluni. Onkur vil hakda at vit tí kunnu fáa onkrar broytingar framdar á hesum øki.

Annars greiðir Helena Dam á Neystabø frá, at tey skulu hitta nógv fólk á ferðini. Serligan áhuga hevur tað at hitta íslendsku, grønlendsku og álendsku umboðsstovurnar, sum eru í ES-høvuðsstaðnum.

Helena Dam á Neystabø veit ikki enn, hvønn form fyri umboðsstovu vit skulu hava í ES-høvuðsstaðnum, men hon heldur, at okkurt sjálvsagt má gerast.

- Vit hava eina umboðsstovu í Aberdeen og eina í Keypmannahavn. - Einki hevði verið meiri náturligt, enn at vit eisini høvdu eina tættari marknaðinum - í Brússel, sigur formaðurin í løgtingsins uttanlandsnevnd, Helena Dam á Neystabø í viðmerking til Sosialin.

Limirnir, sum eru við í ferðini eru: Helena Dam á Neystabø úr Sjálvstýrisflokkinum, Atli Hansen, Sambandsflokkurin, Henrik Old (fyri Maritu Petersen) úr Javnaðarflokkinum, Bjarni Djurholm úr Fólkaflokkinum, Jógvan Durhuus úr Tjóðveldisflokkinum, Jenis av Rana úr Miðflokkinum og Ingeborg Vinther úr Verkamannafylkingini.

*Lars Bruvoll frá Danop:*

# Mærsk er eitt professionelt og gott borifelag



*Enn er ikki endaliga avgjørt, hvat felag skal bora í Lopra. Men millum áhugaðu feløgini er tað danska Mærsk Drilling, sum so avgjørt er eitt professionelt og gott borifelag sigur umboð hjá Danop*

JAN MÜLLER

-Tað er einki at ivast í, at Mærsk Drilling er eitt gott borifelag. Tað er eitt rættiliga professionelt felag við drúgvum royndum. Harafturat er tað eisini eitt av teimum stóru og royndu feløgunum í altjóða borivinnu.

Hetta sigur Lars Bruvoll frá danska felagnum Danop, sum stendur fyri fyrireikingini av komandi boringini í Lopra, tá vit spurdu hann um, hvussu Mærsk stendur seg sum borifelag.

Lars Bruvoll vísir á, at Mærsk er bert eitt av fleiri feløgum, sum vilja sleppa at bora í Lopra, og enn er eingin avgerð tikin um, hvør skal bora í Lopra.

Uppá fyrispurning hvørjar royndir Mærsk hevur at bora á landi sigur Lars Bruvoll, at felagið hevur ikki borað á landi í Europa men hevur gjørt tað nógva aðrastaðni í verðini. Men sum borifelag, ið arbeiðir á sjónum, er Mærsk millum tey royndu og virdu feløgini vættar hann.

Avgerðin um hvør fær uppgávuna at bora í Lopra fellur í hesi vikuni. Sosialurinn hevur frá keldum fingið at vita, at tað er longu avgjørt, at Mærsk skal bora, og tað er bert ein proformasak at kunngera hetta alment. Men Lars Bruvoll sigur, at enn er ikki avgjørt, hvør skal hava arbeiðið.

Tað verður Danop, sum letur boriloyvi, men hetta verður gjørt út frá teimum fyritreytum og krøvum, sum tey 18 oljufeløgini, ið fíggja nýggju boringina, hava ásett.

**Taka eisini hædd fyri tí føroyska „elementinum".**

-Vit taka sjálvandi av tí tilboðnum, sum fíggjarliga og tekniskt best livir upp til hesi krøv. Men harafturat verður so eisini hædd tikin fyri tí „føroyska elementinum" tvs. hvussu nógv arbeiði feløgini leggja upp til kann gerast av føroyingum.

Vit spurdu Lars Bruvoll, um Danop hevur fingið nøkur onnur boð frá Oljufyrisitingini ella frá politiskari síðu um at favorisera donsk feløg, eru tey kappingarfør við onnur.

Tað kenni eg einki til. Eg kann bert siga, at tað heilt greitt ikki er ella hevur verið nakað politiskt trýst í sambandi við at lata einum ávísum felag í ávísum landi boriuppgávuna í Lopra. Hetta er ein rein kommerciel uppgáva, og einki annað. Av teimum 18 feløgunum, sum stýra hesum projektinum, er bert eitt danskt. Lat meg tí gera tað fullkomuliga greitt, at vit frá Danop-síðu taka ikki nakað felag framum onnur, tí tað er danskt. Og sum sagt, tað hava vit heldur ikki fingið boð um sigur Lars Bruvoll við Sosialin.

**Frá S&K-felagnum**

**Aðalfundur**

felagsins verður í hølum

**FØROYA ARBEIÐARAFELAGS**

Tjarnardeild 5

**mikukvøldið 13.03.96, kl. 19.30**

Skrá samb. lógum felagsins.

Nevndin




**Døyvafelag Føroya**

Skrivstovan í Døyvahúsinum »Effata«, Íslandsvegur 10 B, er opin mánadag–fríggjadag frá kl. 9–13. Telefon 17597. Telefax 13609. Tekstelefon, ring 0032 og bið um 16929. Limafundur hvørt mánakvøld kl. 19–23.